## Skulu kortleggja havbotnin

Kanada og USA eru vorðin samd um at leggja stríðið um rættindini til økið við Norðpólin til viks fyribils. Ístaðin fyri hava londini gjørt av, at tey skulu samstarva um at kortleggja havbotnin í póløkinum. Sjónvarpið CBS sigur, at kanadiskir ísbrótarar skulu kortleggja botnin á Beaufort-havinum seinni í summar, og sum skilst er ætlanin at fara rættiliga langt norður. Amerikonsku myndugleikarnir hava sagt, at teir fara eisini at gera líknandi kanningar.



## Ásatrúgvin í Strasbourg

Evropeiski mannarættindadómstólurin, sum hevur sæti í Strasbourg, hevur avgjørt at viðgera eitt mál ímillum íslendska Ásatrúarsamfelagið og íslendska ríkið. Tað er Ásatrúarsamfelagið, sum hevur kært stjórnina fyri at gera mun á landsins trúarsamfeløgum. Ásatrúarsamfelagið vísir á, at tað fær 30 prosent minni almennan stuðul fyri hvønn lim, enn tann almenna kirkjan fær, og tað hedlur Ásatrúarsamfelagið vera brot á mannarættindini.

# Roykibann ger stóran mun

**Føroya Felag Móti Krabbameini fegnast um, at roykibann á almennum støðum nú er sett í gildi í Føroyum. Royking og passiv royking eru sjúku- og krabbameinselvandi, og tí hevur eitt alment roykibann alstóran týdning, heldur felagið**

ROYKIBANN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á hvørjum árið fáa á leið 200 føroyingar staðfest krabbamein, staðfestir Føroya Felag móti Krabbameini. Felagið vísir í tíðindaskrivi á, at altjóða metingar siga, at umleið ein triðingur av øllum teimum, sum fáa staðfest krabbamein, fáa sjúkuna orsakað av royking. Sostatt fáa millum 60 og 70 føroyingar um árið krabbamein orsakað av royking.

- Og tað ber til at gera nakað við hesi keðiligu hagtøl. Ein altjóða arbeiðsbólkur av granskarum hevur kannað hvørji árin almenn roykibann hava, og niðurstøðan er greið. Roykibann ger mun, sigur felagið.

Sambært kanningini minka almenn roykibann um passiva royking, tá arbeiðspláss eru roykfrí roykja roykjarar minni, og har tað er bannað at roykja á almennum støðum, byrja færri ung at roykja.

Samstundis vísir kanningin, at roykibann á almennum støðum ikki ávirkar talið av vitjanum í matstovu- og barrvinnuni.

- Peter Boyle, leiðari fyri altjóða arbeiðsbólkin, staðfestir tí, at almennur roykipolitikkur og roykibann hava alstóran týdning, sigur Føroya Felag móti Krabbameini.

Royking hevur álvarsamar fylgir fyri heilsuna. Umframt lungnakrabba er royking eisini viðvirkandi til krabbamein aðrastaðni í kroppinum, m.a. í munni, hálsi, búkspýttkirtli, maga, urinbløru og lívmóðurhálsi.

- Royking førir eisini til aðrar lungna- og hjartasjúkur, diabetes, magasár og veikari beinagrind, og eiturevni í tubbaksroyki ávirka førleikan hjá bæði monnum og kvinnum at fáa børn, sigur Jansy Gaardlykke, sum er dagligur leiðari hjá Føroya Felag Móti Krabbameini, sum tí fegnast um, at alment roykibann er sett í gildið í Føroyum.



*- Roykibann ger mun til tess at minka um talið á roykjarum. Tá arbeiðspláss eru roykfrí, royka roykjararnir minni, vísir kanning*

# Nýggjur arbeiðsportalur til føroyingar um allan

**Føroyingar úti og heima kunnu framyvir marknaðarføra seg mótvegis føroyskum arbeiðsgevarum og halda seg betur kunnaðar um starvsmøguleikar í Føroyum umvegis nýggja arbeiðsportalin Arbeidi.fo, sum fer í luftina hósmorgunin 3. juli**

KT
*Tíðindaskriv*

Arbeidi.fo hevur til endamáls at geva øllum, ið umhugsa at finna sær nýtt arbeiði í Føroyum, betri møguleikar at gera vart við seg mótvegis føroyskum arbeiðsgevarum. Umframt at geva brúkarum eitt skjótt og lætt atkomuligt yvirlit yvir leys størv, er nýggi arbeiðsportalurin eitt hent amboð hjá teimum sum ynskja at fremja sína starvsleið í Føroyum – uttan mun til um tey longu eru á føroyska arbeiðsmarknaðinum ella eru í útlegd uttanlands

Arbeidi.fo er ikki bert ætlað teimum, ið leita sær eftir arbeiði her og nú, og málbólkurin hjá nýggja portalinum eru øll sum onkursvegna hava áhuga í at halda seg kunnaðan um møguleikarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

- Størsti parturin av føroysku arbeiðsmegini situr væl nøgd í góðum størvum í Føroyum og uttanlands, men hesi fólk eru kortini sum oftast opin fyri einum tilboðið um eitt nýtt starv. Hetta eru ikki fólk sum blaða spent í bløðunum hvørt kvøld eftir nýggjum starvi, men við Arbeidi.fo kunnu tey anonymt leggja sítt CV á netið og fáa beinleiðis boð, tá eitt starv, ið hóskar til teirra ynskir, verður lýst leyst, sigur Hergeir Vang, marknaðarleiðari á Sp/f Internettænastur, sum hevur ment og rekur Arbeidi.fo

At málbólkurin eisini fevnir um fólk, sum longu hava funnið seg til rættis á arbeiðsmarknaðinum er ein umráðandi partur av hugsjónini handan nýggja portalin.

- Hetta er ikki ein arbeiðsávísing fyri arbeiðsleys, men eitt amboð hjá einstaklingum at koma víðari í arbeiðslívinum. Tað er einki at taka seg aftur í at føroyingar eru vorðnir meira opnir fyri at skifta arbeiði nakrar ferðir ígjøgnum lívið, heldur enn at brenna fastir á einum arbeiðsplássi. Hóast fólk eru væl nøgd og hava eitt gott arbeiði, kunnu øll fáa brúk fyri at skifta umhvørvi, fáa meira í løn ella fáa betri arbeiðsumstøður. Hesum vilja vit hjálpa teimum við, sigur Hergeir Vang.

Umframt at tekna seg til at fáa boð um ávís størv ber eisini til at leggja sítt CV á Arbeidi.fo. Einki krav er um at tú skalt hava føroyskt P-tal fyri at skráseta teg á Arbeidi.fo, og sostatt hava útlendingar javnbjóðis møguleika at kunna seg um størvini á portalinum. Seinni í ár er ætlanin at gera portalin tøkan á enskum, so útlendingar við áhuga fyri at arbeiða í Føroyum hava betri møguleikar at bjóða seg fram fyri føroyskum arbeiðsgevarum umvegis CV grunnin á Arbeidi.fo




Arbeidi.fo er ein ókeypis tænasta fyri arbeiðstakarar, og fram til 15. august í ár verður eisini ókeypis hjá arbeiðsgevarum at lýsa á portalinum.

Sp/f Internettænastur stendur aftanfyri Arbeidi.fo, sum verður rikið óheft av arbeiðsgevarafelags- og arbeiðstakarafelagsáhugamálum.